Televarpið
Fleiri rásir - einki roks

Á Kanal 5 sunnukvøldið kl. 22.25

# Man on the Moon



Jim Carrey í høvuðsleiklutinum sum Andy Kaufman



*Ongantíð visti áskoðarin at siga, hvat hesin ørligi skemtarin fór at borðreiða við: at vísa teknifilm, herma eftir Elvis Presley, lesa upp úr The Great Gatsby ella at bjóða ta forvitnu áskoðarafjøldina út við sær at drekka mjólk og eta smákøkur*

Hesin ævisøguligi filmurin snýr seg um tann so nógv umstrídda skemtaran Andy Kaufman. Hesin amerikanski sjónleikarin kundi finna uppá hvat sum helst undir sínum framførslum. Ongantíð visti áskoðarin at siga, hvat hesin ørligi skemtarin fór at borðreiða við: at vísa teknifilm, herma eftir Elvis Presley, spæla kongatrummur, lesa upp úr The Great Gatsby ella at bjóða ta forvitnu áskoðarafjøldina út við sær at drekka mjólk og eta smákøkur. Men Kaufman kom væl á veg á síni yrkisleið, tá hann slapp at framføra á kendu skemtileikrøðini Saturday Night Live. Eisini kom hann fram á sjónvarpsskíggjanum og bleiv alment kendur í skemtirøðini Taxi. Her var hann í leiklutinum sum tann sera løgni, russiski tilflytarin Latka Gravas. Fyri flestu áskoðarar bleiv tað tó ov nógv av tí góða, tá Kaufman í sínum framførslum valdi at brúka karakterin Tony Clifton, sum ímyndaði ein sera óhøviskan persón við grovum atburði. Skemti hjá Kaufman fekk ein rættiliga absurdan dám. So, tá hann í 1984 alment trein fram og kunngjørdi, at hann var raktur av deyðiligum lungnakrabba, hildu vinir, starvsfelagar og fjepparar hetta bert vera enn eina margháttliga skemtisøgu.



*Kostráðgevin Lene Hansson vil vera við, at tú er tað tú etur*

# Tú er tað tú etur

Á Tv3 hóskvøldið kl. 20.00



*Tv3 fer í hernað ímóti ringum kostvanum, og við einum kostráðgeva ynskja tey at broyta matvanarnar hjá luttakarunum í sendingunum*

Tv3 fer við hesi sendingini í hernað ímóti ringum kostvanum. Hyggjarin hittir í hvørji sending ein nýggjan dana, ið hevur trupulleikar við at fáa vektina niður á eitt góðtakiligt støði. Yvir eitt tíðarskeið á átta vikur hjálpir kostráðgevin, Lene Hansson, luttakararunum við at hyggja nærri at hvat í veruleikanum er í matinum, og samstundis eisini hvørjar fylgjurnar eru, tá lívsstílurin er ósunnur. Síðan hjálpir Lene luttakarunum við at eta tað rætta, soleiðis at teir tapa seg. Tað er galdandi fyri øll, at ein sunnari lívsstílur ger lagið betri, gevur meiri orku og hækkað lívsvirði. Í sendingunum finnast fleiri góð ráð og snildir fyri at nærka seg einum sunnari lívsstíli. Sendingin snýr seg hesaferð um familjuna Mads og Conni við børnum. Tey bjóða nevniliga kostráðgevaranum vælkomnari, tí tey kenna seg ikki makta at stýra teirra ósunna lívsstíli.